**Kristjan Árnason** skjal (23)

| | |
|---|---|
| **Fra:** | dat@dat.fo |
| **Sendt:** | 5. september 2018 10:30 |
| **Til:** | Almannamálaráðið |
| **Cc:** | Nella Festirstein |
| **Emne:** | SV: Hoyring - Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) við fleiri send til hoyringar |

Góðan dag Almannamálaráðið.

Dátueftirlitið hevur ikki aðrar viðmerkingar til :

- **Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**
- **Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum**

sum send eru eftirlitinum til hoyringar enn, at :

**sambært § 24 í lógaruppskotinum um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin kunnu avgerðir tiknar sambært § 8 kærast til Tvingsilsnevndina**.

Tað sæst ikki, hvør ið kann kæra, og spurt verður, um hetta eru tey, ið inntrivini eru vend ímóti, teirra avvarðandi, onnur starvsfólk, onnur?

**Alment kann verða viðmerkt**, at Dátueftirlitið hevur við millumbilum heitt á Almannamálaráðið um at fáa lógarheimild til vega, tá um ávaringar- og peilingarskipanir ræður. So tað er rætt, at ásetingar verða at seta í lóg hesum viðvíkjandi.

Sjálvsagt krevst, at mannagongdir verða gjørdar við støði í teimum lógarásetingum, sum fevna um inntriv í sjálvsræði, men tað er fevnt av eftirlitsarbeiði Dátueftirlitisins, altso hetta við í hesum førum at kanna, um lógarheimildir verða framdar í verki soleiðis, at persónsupplýsingar verða handfarnar í samsvari við persónsupplýsingarlógina.

Vinarliga

Eyðhild Skaalum

stjóri

**Dátueftirlitið**

Postboks 300
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 309100
Far. +298 599100
Fax. +298 309101
eydhild@dat.fo
www.dat.fo

---

**Fra:** Almannamálaráðið <amr@amr.fo>
**Sendt:** mánadagur, 23. juli 2018 11:31
**Til:** blf@blf.fo; hhff@hhff.fo; 'Heilsurøktarafelagið (heilsurokt@gmail.com)' <heilsurokt@gmail.com>; pedagog@pedagogfelag.fo; fys@fys.fo; etf@etf.fo; srfelag@gmail.com; info@sjukrarokt.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; dat@dat.fo; riomfr@fo.stm.dk; starvsmannafelag@starvsmannafelag.fo; lararaf@lararafelag.fo; mail@psykolog.fo; annikabh@hotmail.com; heilbrigdi@heilbrigdi.fo; arnmar@frelsunarherurin.fo; blakross@blakross.fo; radgevingin@radgevingin.dk; als@als.fo; lp@mail.fo; industry@industry.fo; samtak@samtak.fo
**Emne:** Hoyring - Løgtingslóg um almannatrygd og vælferð (vælferðarlógin) við fleiri send til hoyringar

Hervið verða hesi uppskot send tykkum til hoyringar:

- **Uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og vælferð**
- **Uppskot til løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m.**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kærunevnd í almanna- og heilsumálum**

Freistin at gera viðmerkingar er fríggjadagin 14. september kl. 12 og heitt verður á tykkum um at senda møguligar viðmerkingar til amr@amr.fo

Um spurningar eru, ber til at venda sær til Marjuna Magnussen, deildarstjóra í Almannamálaráðnum á teldupost: marjun.magnussen@amr.fo

***[Kristjan Árnason]***

Vinaliga

f. Almannamálaráðið
Sólgerð Hjørleifsdóttir, leiðsluskrivari